

# vegurin fram

eisini á, at í Danmark er tað fíggjarmálaráðið, sum stýrir orku- og umhvørvismálum, og hann helt fyri, at hetta er ein vanlukka fyri Danmark, sum hann tók til, tí landið ikki í dag longur gongur á odda í arbeiðnum við varandi orku.

Svend Auken fýltist eisini á, at fyritøkur fáa ov fríar ræsur á umhvørvisøkinum - og hugsað verður í ov stóran mun um stuttskygdan fíggjarligan vinning.



Leiðarin á Oljufyrisitingini:

# Auken staðfesti tað, sum vit arbeiða við í Føroyum

**– Fyrilesturin hjá Svend Auken var áhugaverdur, men tað var sum so einki í honum, sum vit ikki vistu. Hinvegin fegnast vit um, at tað, sum fyrrverandi danski orku- og umhvørvismálaráðharrin segði, júst er í tráð við arbeiðið hjá Vinnumálaráðnum at orða ein yvirskipaðan orku- og umhvørvispolitikk, sigur Sigurd í Jákupsstovu, leiðari á Oljufyrisitingini**

ORKA OG UMHVØRVI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Leiðarin á Oljufyrisitingini, Sigurd í Jákupsstovu, heldur, at fyrilesturin hjá Svend Auken var áhugaverdur og viðkomandi, og hann viðgjørdi neyvt trupulleikarnar við dáking - eins og hann vísti á, hvat gjørt verður í øðrum londum við orkusparing og alternativari orku.

- Men tað var einki nýtt í fyrilestrinum sum so; har var einki, sum vit ikki vistu frammanundan - og einki kollveltandi, sum Sigurd tekur til.

Leiðarin á Oljufyrisitingini fegnast mest um, at fyrrverandi danski orku- og umhvørvismálaráðharrin "bekreftaði" tað, sum landsstýrið og Vinnumálaráðið arbeiða við, nú ein yvirskipaður orku-og umhvørvispolitikkur verður settur út í kortið.



*- Tað var einki nýtt og einki kollveltandi í fyrilestrinum hjá Svend Auken, men hann var áhugaverdur og í samsvar við tað, sum landsstýrið sær sum ein yvirskipaðan orku-og umhvørvispolitikk, sigur Sigurd í Jákupsstovu*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

- Fyrilesturin var enn ein staðfesting av, at eisini vit føroyingar noyðast at tillaga okkum broyttu umstøðurnar, at vit noyðast at brúka orkuna betur og soleiðis eisini ganga betur um umhvørvið.

Sigurd heldur, at sjónarmiðini hjá Svend Auken eru í tráð við tað, sum landsstýrið arbeiðir við, og tað var áhugavert at hoyra, hvussu nógv sjónarmiðini, sum Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í orku-og umhvørvismálum, legði fram á sama fundi, samsvaraðu við tað, sum Svend Auken tosaði um í sínum fyrilestri.

- Eg var ikki ósamdur við nøkrum av tí, sum Auken segði, men nøkur viðurskifti, sum hann var inni á, verða nokk ikki so løtt at fremja í verki, eitt nú tá ið Svend var inni á møguleikum við alternativari orku umborð á skipum.

Leiðarin á Oljufyrisitingini vísir á, at neyðugt er við hugburðsbroytingum, tá ið ræður um orkusparing, tí neyðugt er um alt samfelagið at ansa eftir, at vit ikki brúka meira orku enn neyðugt - og at vit dálka sum minst.

- Neyðugt er við reglugerðum, ráðgeving og kunning, sum eigur at røkka út í hvørt einasta húsarhald í Føroyum, sigur Sigurd.

Hann vísir á, at landsstýrið hevur ikki amboðini at fremja orkueffektivisering, sum hann tekur til, og tí er neyðugt, at vit fyrst fáa ein yvirskipaðan orku- og umhvørvispolitikk og síðan eina el-veitingarlóg.

- Sum er, hevur politiski myndugleikin næstan onga møguleika at ávirka hesi viðurskifti, og tí er neyðugt við reglugerðum og heimildum á økinum, sigur leiðarin á Oljufyrisitingini, Sigurd í Jákupsstovu.